# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Steingrím við Stein, búsitandi í Skibby, ættaður úr Tórshavn**, andaðist í heiminum týsdagin 16. februar, 84 ára gamal.

**Jógvan Justinussen, ættaður úr Leirvík**, fer til gravar frá Lynes kirke, Hundested fríggjadagin kl. 11.

**Olrik Christiansen frá Gjógv** andaðist mánakvøldið á Mørkini í Streymnesi, 92 ára gamal. Farið verður av Mørkini hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Olrik, kunnu lata Mørkini eina peningagávu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Sofía Jacobsen**
(Fía í Skálum)
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Theodor Olsen, prest, fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Vestmanna Missiónshús.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum, sum bakaðu til ervið.
Tøkk til bilførarar og heimahjálparar, sum hava verið um hana.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Dánial, Sámal Jákup og Jóhanna**

## Dagurin

**18. februar. Concordia**, deyð umleið ár 250. Lítið kend halgikona í fornkirkjuni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Fyri 20 árum síðan:

# Blómur og kreppa

**Sosialurin leygardagin 17. februar 1990. Handilskjarnin er nýggjur, Fossbankin stendur í besta blóma og blómuhandil letur upp samstundis sum búskaparkreppan er farin at merkjast við m.a. at lastbilaeigarar missa arbeiði og sleppa ikki av við sínar bilar**



*Nýggi blómuhandilin Fa. Trónd Hansen við Áarvegin í 1990. Kolbrún saman við mostur síni Elinborg Trónd Johansen*

Tíðindablaðið Sosialurin 17. februar 1990 lýsir nokk so væl støðuna í Føroyum áðrenn búskaparkreppuna fyrst í 90-unum.

Blaðið skrivar at Fossbankin hevði eitt gott ár í fjør, tá fíggjarjavnin rundaði hálva milliard frá 426 milliónum í 1988 til 507 milliónir í 1989. Bankin fer nú saman við øðrum at søkja landsstýrið um loyvi til at fara undir tryggingarvirksemi.

Føroyskir lastbilaeigarar eru í dýrastu neyð. Teir hava gjørt stórar íløgur í lastbilar, og nú er einki arbeiði, og teir sleppa heldur ikki av við sínar bilar. Blaðið skrivar, at Schumann Hjaltalin sølumaður hevur fingið samband við fyritøkur í Danmark, Finnlandi og Íslandi, sum eru hugaðar at keypa brúktu lastbilarnar.

Síðan Handilskjarnin við fyrstu rullitrappuni í Føroyum læt upp, hava fleiri børn valt sær rullutrappuna til spælipláss. Mikudagin datt ein smágenta ovast úr rullutrappuni og heilt niður á gólvið. Tann seks ára gamla gentan varð beinanvegin flutt á Landssjúkrahúsið. Vakthavandi lækni upplýsir fyri blaðnum, at hon hevur fingið heilaskjálvta og verður liggjandi á sjúkrahúsinum, til hon er komin fyri seg.

Blaðmannafelagið hevur nú fyri fyrstu ferð fingið ein kvinnuligan formann. Tað er Randi Jacobsen, sum starvast á tíðindablaðnum Sosialinum. Randi tekur við eftir Høgna Djurhuus, sum hevur verið formaður í felagnum í seks ár.

Ein yvirskrift í blaðnum er "Nú blómar aftur á Áarvegnum". Tað er um nýggi blómuhandilin Fa. Trónd Hansen, sum Kolbrún, abbadóttir Trónd Hansen læt upp við Áarvegin - í grannalagnum har sum abbin áður hevði havt blómuhandil.

*- red*



*Høgni Djurhuus og Randi Jacobsen*



tíðindablaðið
sosialurin

Smágenta datt av trappuni

Ætlar at selja 18 lastbilar

*Tíðindablaðið Sosialurin 17. februar 1990*

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin tann 20. feb. verður Palli Olsen í Fuglafirði 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
4. feb. høvdu Oda og Árni Frederiksberg á Strondum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjakvøldið 19. feb kl. 18 í Kelduni í Skálafirði. Øll eru vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. hava Jóhanna Maria Kirstin, vanliga kallað Hannimia, og Sigurd Sofus Nybo, Hósvík, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. giftast Thomas F. Johannessen, Æðuvík, og Ann-Margit Hansen, Saltnes. Opið hús verður í Stóratún 14, Æðuvík, frá kl. 18.

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke, Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúðleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).